PDF-XChange
Click to buy NOW!
www.docu-track.com

PDF-XChange
Click to buy NOW!
www.docu-track.com

# BÚNAÐARSTOVAN





## TILMÆLI OG RAKSTRARÆTLAN Í SAMBAND VIÐ

## VARÐVEITING AV

## HÚSDÝRUM AV FØROYSKUM UPPRUNA





Apríl 2011

PDF-XChange Click to buy NOW! www.docu-track.com

PDF-XChange Click to buy NOW! www.docu-track.com

Til

Landsstýrismannin í landbúnaðarmálum

Fiskimálaráðið
Bókbindaragøta 8
100 Tórshavn

## INNIHALDSYVIRLIT


| | | |
|---|---|---|
| Tilmæli til landsstýrismannin | síða | 2 |
| Frágreiðing til rakstraræltanina | síða | 3 |
| Rakstraræltan | síða | 4 |


## Innleiðing

Vísandi til avrikssáttmálan millum Búnaðarstovuna og Fiskimálaráðið fyri 2010, gleðir tað meg, at kunna lata tygum tilmæli, um varðveitingarskipan fyri føroysk húsdýr. Tilmæli og rakstraræltanin eru gjørd við útgangsstøði í faktisku viðurskiftunum sum Búnaðarstovan og húsdýrini eru í, eins og eftir tilmæli sum ein arbeiðsbólkur gjørdi fyri landsstýrismannin í mentamálum, um sama evni í august 1999. Tilmæli frá 1999 er sostætt partur av tilmælinum frá Búnaðarstovuni og er hjálagt.

Búnaðarstovan hevur síðani, tillagað rakstraræltanina til viðurskiftini støðin og húsdýrini nú eru í. Partin um útisavn á Føroya Fornminnissavni, ið nevndin frá 1999 hevði við í sínum tilmæli, er ikki tikin við í hesa ætlan.

Í samband við fígging av verkætlanini loyvir undirritaði sær at vísa til uppskot landsstýrismansins í samband við broyting í lóg um Búnaðargrunn, sum lagt er fyri tingið, tá skotið varð upp at marka festikonturnar hjá ávikavist Royndarstøðini í Hoyvík og Kollafirði til onnur endamál. Uppá fyrispurning í tinginum nevndi landsstýrismaðurin, at peningurin á festikontu hjá Royndarstøðini í Kollafirði skal brúkast til dagføring av støðini, meðan peningur til stovnan av tjóðgarði í Koltri skal takast av festikontuni hjá Royndarstøðini í Hoyvík. Tjóðgarðsætlanin í Koltri byggir á trý kjarnuøkir, varðveiting av forna bygdalagnum, varðveiting av føroyskum húsdýrum og friðing av náttúruøki og mentunarlandslagnum. Av tí at føroysku húsdýrini nú eru í tí serstøðu, at varðveitingartiltak ikki kann bíða, verður skotið upp, at fíggingin til hetta bráfeingis tiltak, sum tað er, at taka ábyrgd av varðveitingini av føroyskum húsdýrum, verður tikið av hesi kontu og síðani løgd undir tjóðgarðsskipanina, tá tann ætlanin endaliga fyriliggur.

Avgerðandi fyri ætlanina verður hvørji úrslit serfrøðingar koma til og ikki minst hvussu áhugin og undirtøkan frá einstaklingum verður fyri føroysku húsdýrunum.

Tilmæli er framløgd á fundi saman við serfrøðingum og áhugafólki.

Kollafirði, hin 12. apríl 2011

_________________
Bjørn Patursson

PDF-XChange
Click to buy NOW!
www.docu-track.com



PDF-XChange
Click to buy NOW!
www.docu-track.com

## Varðveiting av húsdýrum av føroyskum uppruna

Í avrikssáttmálanum fyri 2010 lovaði Búnaðarstovan tygum eitt tilmæli um eina varðveitingarskipan fyri føroysk húsdýr.

Undir arbeiðinum varð staðfest, at landsstýrismaðurin í mentamálum í 1998 setti eina nevnd at gera tilmæli um, hvussu eitt varðveitingararbeiðið viðvíkjandi húsdýrum av føroyskum uppruna eigur at verða skipað á skilabesta hátt, herundir:

- at gera ætlan um, hvussu teir mest átrokandi spurningarnir verða loystir her og nú
- at gera uppskot til ein varðveitingarpolitikk fyri húsdýr av føroyskum uppruna
- at gera uppskot um, hvør skal umsita varðveitingararbeiðið nú og framyvir
- at lýsa allan spurningin um varðveitsluna av húsdýrum av føroyskum uppruna og leggja eina strategi um varðveitingarpolitikkin í framtíðini
- at gera kostnaðarmetingar í samband við tey tilmæli, ið bólkurin leggur fram

Búnaðarstovan hevur gjøgnumgingið tilmæli frá 1999 og staðfest, at tað stórt sæð er í trá við niðurstøðuna, sum Búnaðarstovan annars er komin til eftir at hava gjørt metingar um støðuna og arbeitt við málinum um húsdýrini av føroyskum uppruna. Avgjørt er tí at brúka hetta tilmæli sum grundarlag undir niðurstøðu Búnaðarstovunar til tygum.

Skal nakað munagott gerast, er fyrsta treytin, at neyðug játtan fæst til vega soleiðis, at Búnaðarstovan fær orku og neyðugar karmar til at átaka sær uppgávuna sum miðstøð fyri føroysk hýsdýr. Bráneyðugt er at kunna veita einstaklingum peningaligan stuðul til hald av teimum húsdýrunum, sum eru serstakliga krevjandi eins og neyðugt er at játta neyðugan pening til at Búnaðarstovan kann fara undir arbeiðið at fyrireika, skráseta og staðfesta støðuna soleiðis, at eitt neyvt yvirlit fæst yvir hvørji húsdýr eru til eins og at leggja ætlan fyri eitt skipað aliarbeiðið framyvir.

Búnaðarstovan vil uttan drál fara undir arbeiðið, so skjótt støða er tikin til tilmæli og neyðug játtan er tøk.

Tilmælið frá 1999 er eftir okkara meting dygdargott tilfar og avgjørt nøktandi til at taka støðu út frá, hóast ávís viðurskiftir og fortreytir eru broyttar síðani 1999. Búnaðarstovan hevur gjørt nýggjar kostnaðarmetingar, og hjálagt er ein fíggjarætlan, sum ætlandi byrjar í 2012. Gjørt verður vart við, at í løtuni hevur Búnaðarstovan ikki arbeiðsorku til at fremja ætlanina í verki. Ein avgerðandi fyritreyt er tí, at Búnaðarstovan fær játtað umbønina um normeringina av røktarastarvi, send tygum í øðrum máli.

Í arbeiðinum at koma til omanfyri standandi niðurstøðu hevur Búnaðarstovan havt fundir og samrøður við umboð fyri felagið Føroysk Ross, persónar úr nevndini, sum gjørdi álitið frá 1999, og onnur heimildafólk, sum kenna til umstøðurnar hjá føroyskum húsdýrum.

Hjálagt er uppskot til rækstrarætlan fyri eina varðveitingarskipan av føroyskum húsdýrum og eitt eintak av tilmælinum frá 1999.

Búnaðarstovan er altíð til reiðar at svara spurningum, útvega neyvari tilfar ella útgreina tilfarið meira, um tygum ynskja tað. So skjótt landsstýrismaðurin hevur tikið støðu í málinum, vænta vit at hoyra nærri frá tygum.

PDF-XChange
Click to buy NOW!
www.docu-track.com

# Frágreiðing til rakstrarætlanina

## Sáð, eggtøka, frysting og goymsla

Avgerðandi fyri varðveitsluna, serliga av størru húsdýrunum sum neyt og ross verður at fáa niðurfryst og goymt ílegur við sáði og eggum. Slíkt arbeiðið má gerast av serfrøðingum, og tað krevur eisini, at serfrøðingar fáa høvi at granska og seta seg inn í nýggjastu granskingarútslit á hesum økjum. Eitt annað í hesum sambandi er tað praktiska, at flyta húsdýr í samband við paringar og tilvenjing í hesum sambandi.

## Kynbøting

Tá talan er um hótt djórasløg, sum so fá eru eftir av, má paring og kynbøtingin tilrættaleggjast av serfrøðingum í minstu smálutir. Umráðandi er, at fáa øll húsdýrini neyvt skrásett í telduskipan, sum kann hjálpa til við at halda skil á hvørji húsdýr eru tøk í alingini, eins og hvør kann parast við hvørjum. Útvegast má telduútgerð, eins og at samstarv má fáast í lag við NGH og aðrar serfrøðingar um hesi viðurskiftir.

## Arvafrøðiligar kanningar

Føroysku rossini eru staðfest, at verða av serføroyskum uppruna við at gera arvafrøðiligar kanningar og staðfestingar. Út frá hesum kanningum og staðfestingum eiga avgerðirnar at verða bygdar og tiknar um hvørji stig skulu takast fyri ymsu húsdýrasløgini. Arvafrøðiligar kanningar skulu gerast í samstarvi millum serfrøðingar frá miðstøðini fyri føroysk hýsdýr og serfrøðingar og kanningarstovur í útlondum.

## Virðislønir til góðkend alidýr

Altavgerðandi fyri, um tað skal eydnast at varðveita føroysku húsdýrini, er áhugin millum vanliga fólkið og einstaklingar, sum vilja eiga og halda hesi húsdýr. Orsøkin til, at føroysku húsdýrini eru hótt, er (sí eisni tilmæli frá 1999), at onnur innflutt hýsdýr antin eru betri til brúks og/ella geva meiri av sær í framleiðslu. Rossini eru t.d. hótt av íslandsrossum sum sigast at vera betri egna til ríðing enn tey føroysku.Virðislønin til góðkend húsdýr er skotin upp sum ein eggjan til tey, sum hava umstøður at hava slík húsdýr og sum eitt ískoytið til at gera sær umstøðurnar soleiðis, at tað ber til eitt nú við hegni og røkt. Hugsanin er, at tað einans eru húsdýr, sum eru góðkend alidýr sum fáa húsdýravirðisløn. Tað vil siga, at miðstøðin fyri føroysk húsdýr skal gera reglur og treytir fyri húsdýravirðislønirnar so sum, at viðkomandi húsdýr skal kunna brúkast í alingini eftir treytum og leiðbeining frá miðstøðini eins og at eigaraviðurskiftini til avkom o.a. skulu avtalast. Tey sum kenna til húsdýr vita, at greðingar eru serstakliga truplir at hava, eins og at sáð undan greðingum er trupult at fáast við í mun til eitt nú tarvasáð. Hetta er orsøkin til, at rossini verða tunga uppgávan at lyfta fyri føroyingar í samband við varðveiting av húsdýrum av føroyskum uppruna. Nærliggjandi er, at miðstøðin fyri húsdýr má keypa flestu greðingarnar, men tá verður virðislønin til greðingar flutt miðstøðini heldur enn einstaklingum.

## Kjarnustovnur flogfenaður

Flogfenaðurin er torførur at halda skil á, og hann nørist skjótt. Tó er fyrimunurin, at hesin ikki er so tungur at hava við at gera sum stórdýrini. Helst er hetta orsøkin til, at bólkurin í tilmælinum frá 1999 mælir til at miðstøðin fyri húsdýr skal hava ein haldgóðan og álítandi stovn av flogfenaði á støðini, soleiðis at flogfenaður av føroyskum uppruna til eina og hvørja tíð er tryggjaður.

## Miðstøð fyri føroysk húsdýr

Í hesum føri er rakstrarætlanin bygd á, at viðurskiftini á Búnaðarstovuni verða tillagað soleiðis, at Búnaðarstovan eftir okkara metingum verður før fyri at lúka mest neyðturvuligu krøvini sum koma í samband við, at Búnaðarstovan verður kosin til miðstøð fyri føroysk húsdýr. Ein høvuðsumvælingarætlan er í gerð fyri bygningarnar hjá Búnaðarstovuni, meðan tað sum her er tikið við einans er til smærri tillagingar og broytingar í innrætningi til húsdýrini. Sum er, hevur Búnaðarstovan ikki fólk til at taka sær av húsdýrarøktini, og verður í hesum sambandi víst til umbøn Búnaðarstovunar um normering av røktarastarvi sent Fiskimálaráðnum í øðrum máli.

## Serfrøði

Gingið er út frá, at Búnaðarstovan verður miðstøðin fyri føroysk húsdýr. Tó meta vit, at Búnaðarstovan eigur at halda samband við serfrøðingar og persónar sum sita inni við vitan um hesi sermerktu húsdýr.



PDF-XChange
Click to buy NOW!
www.docu-track.com

PDF-XChange Click to buy NOW! www.docu-track.com
PDF-XChange Click to buy NOW! www.docu-track.com

## Rakstrarætlan

| Ár | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 |
|---|---|---|---|---|
| **Kostnaður føroysk húsdýr íalt** | **835.000** | **686.000** | **674.000** | **675.000** |
| Sáð, eggtøka, frysting og goymsla | 80.000 | 75.000 | 75.000 | 70.000 |
| Djóralækni (serfrøðingahjálp) | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| Flutningur av húsdýrum | 15.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 |
| Røkt, tilvenjing og sáðtøka | 15.000 | 10.000 | 10.000 | 5.000 |
| Kynbøting | 175.000 | 130.000 | 110.000 | 110.000 |
| Ráðgeving | 100.000 | 100.000 | 80.000 | 80.000 |
| Skráseting v.m. | 50.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 |
| Annað | 25.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| Arvafrøðiligar kanningar | 120.000 | 80.000 | 80.000 | 80.000 |
| Kanningararbeiðið av serfrøðingi | 120.000 | 80.000 | 80.000 | 80.000 |
| Virðisløn til góðkend alidýr | 212.000 | 218.000 | 226.000 | 232.000 |
| Virðisløn til góðkend neyt | 32.000 | 34.000 | 38.000 | 42.000 |
| Kýr, tal av góðkendum | 8 | 9 | 10 | 11 |
| Tarvar, tal av góðkendum | 8 | 8 | 9 | 10 |
| Kúvirðisløn | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| Tarvavirðisløn | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| Virðisløn til góðkend ross | 180.000 | 184.000 | 188.000 | 190.000 |
| Ryssur, tal av góðkendum | 15 | 17 | 19 | 20 |
| Greðingar, tal av góðkendum | 15 | 15 | 15 | 15 |
| Ryssuvirðisløn | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 |
| Greðingavirðisløn | 10.000 | 10.000 | 10.000 | 10.000 |
| Kjarnustovnur flogfenaður | 50.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 |
| Røkt av stovni | 25.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 |
| Útgerð og aðrar íløgur | 25.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 |
| Miðstøð fyri før húsdýr | 165.000 | 140.000 | 140.000 | 140.000 |
| Umbyggingar til greðingahald | 50.000 | 25.000 | 25.000 | 25.000 |
| Bráfeingis keyp av húsdýrum | 15.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 |
| Varðveitsla av húsdýrum | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| Altjóða samstarv | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| Serfrøði | 33.000 | 23.000 | 23.000 | 23.000 |
| Fundarhald o.tl. | 25.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 |
| Flutningsendurgjald | 8.000 | 8.000 | 8.000 | 8.000 |